# »Virðing« var loysnin

**Sunset-deildin eitur framvegis Bestadeildin í komandi 3-2 sending. Men Kringvarpið hevur viðurkent, at kappingar kunnu bera sponsor-heitið. Sáttmáli, sum tryggjar sendirættindini til ítróttin hetta til nýggjár varð undirskrivaður týsdagin**

SENDIRÆTTINDI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað hevur verið tungur burður hjá Kringvarpinum at fáa í lag nýggjan sáttmála við føroyskan ítrótt. Vanliga hevur hetta ikki verið eitt arbeiði, sum hevur kravt serliga nógva arbeiðsorku, men í heyst og í vetur hava nógvar samráðingar verið um hetta.

### Stóri knúturin

Stóri knúturin var uttan iva, at bæði Út- og Sjónvarpið hava sýtt fyri at nýta nøvn á sponsorum, sum fleiri sersambond hava knýtt at kappingum sínum.

Og við undirskriftini av sáttmálanum duldu teir báðir ovastarnir, Heðin Mortensen og Jógvan Jespersen, ikki fyri, at partarnir til tíðir høvdu staðið rættiliga langt frá hvørjum øðrum.

Í samráðingum er tó náttúrligt, at partar geva seg, og í sáttmálanum vónaðu teir báðir, at ein hóskandi orðing nú er funnin.

»Kringvarp Føroya viðurkennir, at kappingar og deildir í ávísum førum bera nøvn hjá ískoytisveitarum.«

Soleiðis er orðingin, sum at kalla hevur bjargað samráðingunum, og so er spurningurin, hvørt hendan orðingin er nakað, sum partarnir kunnu liva við.

– Hetta er í øllum førum ein útmelding um, at partarnir virða ynskini hjá hvørjum øðrum. Í tann mun, at nýtsla av hesum nøvnum fellur náttúrligt og hóskiligt fara hesi nú at verða integrerað í tær sendingar, sum stovnurin kemur at hava, staðfesti Jógvan Jespersen, tá spurnarrundan kom fyri á tíðindafundinum týsdagin.

### Alt uttan fótbólturin

Í aðrar mátar tykist avtalan ikki víkja so nógv frá teirri, sum higartil hevur verið galdandi. Hon gevur Útvarpspartinum loyvi at senda frá øllum tiltøkum, sum ÍSF og sersambond undir ÍSF skipa fyri. Sjónvarpið fær somuleiðis rættindini at senda frá tiltøkum. Men er talan um beinleiðis sendingar, skal hetta avtalast við avvarandi sersamband. Og avtalan við ÍSF fevnir ikki um fótbóltslandsdystir. Her skal Sjónvarpið í næstum undir samráðingar við Sportsfive, sum hevur keypt øll sjónvarpsrættindi hjá føroyska landsliðnum.

Ikki minst týðandi fyri ítróttin, so inniheldur avtalan eisini eitt notat, har intentiónin við hesi verður lýst. Serstakliga fatanin av, at almennu miðlarnir skulu hava eina ávísa breidd í sínum tíðindaflutningi.

Ítøkiliga verður staðfest, at miðað verður eftir at varpa steypafinalur í hond- og flogbólti, FM-kappingini hjá Svimjisambandinum og kappingum, sum Føroya Fimleikasamband skipar fyri.

Hartil verður staðfest, at allar ítróttagreinar eiga at verða nevndar, og at eingin einstøk ítróttargrein verður fyri mismuni.

### Ikki einkarrætt

Á tíðindafundinum varð eisini staðfest, at hóast avtalan gevur rætt at senda, so gevur hon ikki einkarrætt. Tað merkir, at vilja aðrir veitarar fáa møguleika at senda frá ítróttarhendingum, so stendur hesum frítt at samráðast við ÍSF um hetta.

Avtalan, sum nú er gjørd, kostar Kringvarpinum 300 tkr. Hon er galdandi hetta árið, men í seinasta lagi 31. oktober skulu partarnir taka upp samráðingar um nýggjan sáttmála.



*Tað tók sína tíð, at fáa sáttmálan í lag. Men týsmorgunin kundu partarnir kortini smílast. Her stendur Kringvarpsstjórin millum samráðingarumboðini hjá ÍSF*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Mugu føla okkum fram

Hóast nýggja avtalan um sendirættindi staðfestir, at Kringvarpið viðurkennir nøvn á ískoytisveitarum, so merkir hetta ikki, at sponsor-heiti á nakran hátt verða kroystar yvir redaktiónirnar.

Spurdur beinleiðis, hvørt Sjónvarpið í komandi 3-2 sending fór at skriva »Sunset-kappingin« og »Atlantic Airways-kappingin« á skíggjan, svaraði Øssur Winthereig, tíðindaleiðari, at tað fóru tey ikki.

– Í fyrsta umfari koma vit framvegis at skriva »Bestadeildin«. Men við nýggju avtaluni hava vit viðurkent rættin hjá ítróttinum at nýta slík nøvn.

– Fyri okkum er tó avgerandi, at tað framvegis eru redaktiónirnar, sum gera av, hvat verður sagt og víst í sendingunum. Og tá er altso líkamikið, um tað eru ítróttarfeløg, politikkarar ella sponsorar, sum elva til trýst. Tað er ein prinsipiell støða, sum í okkara hugaheimi er ógvuliga týdningarmikil.

–Trupulleikin er jú eisini, at vit vita ikki, hvar vit enda, um vit binda okkum at nýta sponsor-heiti. Tá kunnu vit lættliga standa í eini støðu, har allar deildir í ymsu ítróttargreinunum hava hvør sítt heiti, og tá fáa vit eitt problem, heldur hann.

Øssur leggur tó samstundis dent á, at hetta komandi árið skal nýtast sum eitt slag av royndarári.

– Í londunum kring okkum eru sum so ikki nakrar greiðar reglur fyri, hvussu slíkar avtalur verða viðgjørdar. Nú kann væl verða, at hondbóltskappingin í onkrum føri verður rópt Sunset-kappingin og onkra tíð okkurt annað. Tað er jú ymiskt, hvussu náttúrlig slík heiti fella. Bæði viðvíkjandi heitinum sjálvum og viðvíkjandi tí, sum sigur frá. Tað er millum annað tað, sum hetta komandi árið skal nýtast til at finna útav, staðfestir Øssur Winthereig at enda.

**-mørk**

## Formula til borðið í komandi viku

Óli Holm, formaður í FSF, sigur seg vóna, at nýggja avtalan við Kringvarpið er av slíkum slag, at hon framvegis ger tað gjørligt hjá sambandinum at hava sponsr-heiti knýtt at kappingum sínum.

Ítøkiliga er tað avtalan við Formula.fo, sum FSF hugsar um í hesum sambandi. Ein avtala, sum varð gjørd í fjør, men sum enn ikki er longd fyri komandi kappingarár. Millum annað tí greiða ikki er fingin á samráðingunum við Kringvarpið.

– Okkara vón er í øllum førum, at báðir partar við nýggju avtaluni virða hvønn anna somikið. Men tá spurt verður beinleiðis um Formula-avtaluna, so fái eg ikki givið nakað greitt svar. Tað er eitt mál, sum vit tosa við veitaran um, sigur Óli Holm.

Hann roknar við, at samráðingar um longt samstarv verða tiknar upp við Formula.fo í komandi viku.

**-mørk**

# Topalov í trupulleikum

**The Wimbledon of Chess, Linares, byrjaði í seinastu viku. Kappingin er komin í helvt og sera óvæntað stríðist heimsmeistarin Veselin Topalov í botninum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Sum nakað nýtt, hava sponskufyrireikararnir valt at býta kappingina í tvey, soleiðis at fyrstu sjey umførini skulu telvast í Morelia í Meksiko, og seinna helvt á vanliga staðnum seinastu mongu árini, í Linares í Spania.

Linares 2005 varð seinasta kapping Garry Kasparovs. Mæti russin vann í fjør saman við Veselin Topalov. Hvør veit um Kasparov ikki ger eitt comeback um nøkur ár?!

Hesir átta telvarar manna siðvondu kappingina í ár: Veselin Topalov, Peter Svidler, Levon Aronian, Peter Leko, Vassily Ivanchuk, Etienne Bacrot, Teimour Radjabov og Vallejo Pons. Allir vælkendir telvarar í heimselituni.

Viswanathan Anand valdi at takka nei til innbjóðingina, millum annað tí, at hann helt at jet-laggið, tá teir skuldi flyta seg yvir um atlantshavið til seinnu helvtina, kundi ávirka telving hansara.

### Leko flúgvandi

Ungarski Peter Leko hevur tikið leiðsluna við 5 stigum av 7 møguligum. Tríggir sigrar og fýra javnleikir. Hann legði út sum eitt ólgi og hevði eftir fimm umfør fýra stig. Síðani leikti hann tveir javnleikir, m. a. móti Topalov í 7. umfari. Torført verður at steðga Leko, sum annars ikki hevur fingið góð úrslit seinastu mongu mánaðirnir.

Aronian og Svidler hava higartil givið Leko skarpasta mótstøðu. Svidler er steðgaður nakað upp eftir eina flúgvandi byrjan, men hansara fýra stig boða tó frá góðum. Aronian, sum heldur ósjónliga er vorðin partur av heimsins sterkastu telvarum, er næstfremstir við 4,5 stigum.

Tann nú 18 ára gamli Teimour Radjabov, sum luttók í 1st Tórshavn International 2000, hevur heilt presis 2700 ratingstig. Og hetta vísir hann eisini í Morelia/Linares. Hann hevur 3,5 stig, eins og Ivanchuk. Spanski Vallejo Pons byrjaði illa, men hevur nú 3 stig. Hann vann við svørtum á Topalov í 6. umfari.

Topalov hevur einans 2,5 stig. Hann hevur havt møguleikar fyri fleiri stigum, men í hesari kapping tykist næstan einki at rigga hjá honum. Topalov vann herfyri Wijk aan Zee saman við Anand, so sjálvsálitið eigur ikki at bila. Hann er ein álopssinnaður telvari, sum konstant tekur kjansir. Sum oftast gongur tað, tó ikki hvørja ferð. Men kenna vit heimsmeistaran rætt, fer hann at fáa eina góða seinnu helvt.

**Støðan 7. umfar**

| | |
|---|---|
| Leko | 5,0 |
| Aronian | 4,5 |
| Svidler | 4,0 |
| Ivanchuk | 3,5 |
| Radjabov | 3,5 |
| Vallejo | 3,0 |
| Topalov | 2,5 |
| Bacrot | 2,0 |

### Finala í Vestmanna

Komandi leygardag endar FM-liðkappingin. Allar deildirnar telva sum vant seinasta og avgerandi umfar á sama staði. Í ár verður farið til Vestmanna.

Øgiligur spenningur er í 1. deild. Vestmenningar eru hálvt stig framanfyri havnarmenn, sum vunnu FM í fjør. Vestmenningar møta kollfirðingum meðan havnarmenn taka ímóti Klaksvík 1.

Í botninum berjast fýra. Tey stríðast bæði fyri bronsumerkjunum og fyri at sleppa undan niðurflyting. Klaksvíksliðini bæði eru í størsta vanda.

Sandavágsmenn hava undan seinasta umfari tryggjað sær uppflyting í bestu deildina.